## Grønlendskt í USA

Í hesari vikuni fáa amerikanarar høvi til at kunna seg um grønlendskan skaldskap. Í sambandi við, at tann serliga amerikanska-grønlendska samstarvsnevndin heldur fund í Washington í vikuni, hevur amerikanska forlagið IPI Press gjørt av at geva seks bøkur við nútímans grønlendskum og amerikonskum skaldskapi út. Tann fyrsta bókin er við yrkingum hjá Aqqaluk Lynge, og høvundurin verður hjástaddur, tá bókin verður løgd fram, sigur KNR.



## Ølið úr miðbýnum

Løgreglan í Nuuk skipaði seinasta vikuskifti fyri einum átaki ímóti teimum, sum ganga ella sita í miðbýnum og drekka øl. Longu frá morgunstundini fríggjadagin fingu fólk, sum drukku øl, boð um at fara úr miðbýnum. Gjørdu tey ikki tað, fingu tey bót, men sambært KNR valdu øll at akta boðini. Løgreglan hevur tó gjørt greitt, at halda fólk fram við at drekka øl í miðbýnum, fáa tey bót, og summi kunnu fáa forboð fyri at koma í miðbýin.



*Ein silvurlitt armketa lá í hesum rugbreyðnum, tá ein havnarkona í síðstu viku skuldi skera breyð til matpakkarnar hjá børnunum. Lærlingurin í Mylnuni, sum misti armketuna í deiggið, hevur nú sagt upp*

*Myndir: Álvur Haraldssen*

# Rugbreyð við armbandi

**Í dag ber til at fáa alt slag av breyðum hjá føroysku bakarum, men eitt rugbreyð við silvurarmbandi mitt inni í breyðnum stendur neyvan á nøkrum innkeypslista. Hetta var tó tað, sum eitt par í Havn fekk, tá tey í seinastu viku keyptu sær eitt vanligt rugbreyð**

MATVØRUR
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Ein havnakona gjørdist ikki sørt skøkk, tá hon fríggjamorgunin skuldi skera breyð til matpakkarnar hjá børnunum. Maðurin hevði verið og keypt nýtt rugbreyð kvøldi fyri, men tá hon skuldi skera breyði í flísar, fekk knívurin ikki skorið ígjøgnum. Okkurt hart var inni í breyðnum.

Konan sker eitt sindur longur inn á breyðnum, og nú bar til. Men harða stykki í breyðnum mátti kannast, og undan kavi kom - eitt armband. Ein brotin silvurreim.

Maðurin, sum hevði keypt breyðið í Mylnuni, vil ikki vera nevndur við navni, og hann hevur ikki kravt endurgjald frá handlinum.

- Eg tími ikki at gera meira burtur úr, men kanska hevur tað almennan áhuga, at man kann finna sovorði í breyðum, sigur hann. Hann viðgongur at hann misti matarlystin fríggjadagin, men hann ætlar sær framvegis at keypa rugbreyð.

- Men frá nú av verður tað skorið breyð, sigur hann.

### Petti funnið í Mylnuni

Í gáramorgunin fingu starvsfólkini í Mylnuni eitt líknandi upplivilsi. Har kom eitt annað petti av sama silvurarmbandi í vegin, tá gomlu breyðini skuldu skerast í skivur.

- Vit funnu eitt petti av eini armreim í einum breyði, og eg kann vátta, at ein lærlingur hjá okkum hevur mist reimina niður í deiggi, sigur Eirikur Magnussen, leiðari á bakaríinum við Sosialin.

Hann greiðir frá, at ein lærlingur hevði ringt inn og sagt seg úr starvið sama morgun, og løtu seinni var ein armreim, sum sami lærlingur átti, funnin í einum breyði í handlinum.

- Lærlingurin hevur vitað, hvat er hent, men hann hevði ikki boðað frá tí. Hetta er sjálvandi sera óheppið. Vit kunnu øll gera onkran feil, men tað hevur alstóran týdning, at slíkt verður loftað beinanvegin, so breyðini ikki vera seld.

Spurdur um tað hevði fingið avleiðingar fyri viðkomandi, um hann ikki sjálvur hevði sagt seg úr starvið, sigur Eirikur Magnussen, at tað hevði tað sjálvandi. Men hann veit ikki, um tað hevði verið uppsagnargrund.

### Ongar reglar

Leiðarin í bakaríinum hjá Mylnuni váttar, at tey ikki hava havt serlig krøv til klæðnabúnað ella prýðislutir.

- Vit gingu út frá, at okkara starvsfólk vóru so umhugsin at tey ikki brúktu slíkt. Men nú mugu vit innføra formellar reglar.

Tað arbeiða 13 fólk í bakaríinum hjá Mylnuni, og Eirikur Magnussen sigur, at man kann ikki altíð verja seg fyri menniskjaligum feilum, men tað týdningarmesta er, at feilurin verður rættaður beinanvegin.

- Eg eri harmur um, at kundin er farin til miðlarnar í staðin fyri at koma til okkum. Tí hetta kann bara vera oyðileggjandi. Og vit høvdu reagerað akkurát líka. Tá vit nú hava sæð, at lærlingar kunnu gera slíkt, so mugu vit innføra strangari reglar, staðfestir Eirikur Magnussen.

# Ikki somu

**Krøvini til matvørutrygd eru ikki tey somu til bakarar sum aðrar matvøruframleiðarar. Og tað eru bara fiskavirkir, sum framleiða til útflutning, sum hava lógarfest krøv til klæðnabúnaðin hjá starvsfólkunum**

MATVØRUR
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Bakarar, sum selja meginpartin av sínu vøru yvir egnan disk, vera ikki roknaðir sum virki, og tí skulu teir ikki lúka somu krøv sum aðrir matvøruframleiðarar. Hetta sigur umboð frá Matvørudeildini hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sum hevur eftirlit við allari matvøruframleiðslu í landinum.

Strangastu krøvini til matvørutrygd eru galdandi fyri tey fiskavirkið, sum selja vørurnar av landinum. Kunngerðin, sum er galdandi fyri hesa vinnu, sigur heilt greitt, at:

Lutir, sum eru framleiðsluni óviðkomandi, og kunnu vera til reinførisligan ampa, mugu ikki vera í framleiðslu- og goymslurúmum.

Starvsfólk í fiskavirkjum hava tí ikki loyv at bera ringar, ur og aðrar prýðislutir. Men hesi krøv eru ikki galdandi fyri matvøruframleiðslu til heimamarknaðan.

### Bakarar eru ikki eitt virki

Sambært kunngerð skulu øll matvøruvirki í Føroyum hava eitt dokumenterað innaneftirlit, har tey skulu ansa eftir matvørutrygdini og herundir eisini persónliga sjálvsrøkt. Eitt slíkt innaneftirlit kann tildømis fevnað um, at persónliga sjálvsrøktin hjá starvsfólkunum verður kannað regluliga, og stikkroyndir verða tiknar av, um starvsfólk bera príðislutir.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur síðani eftirlit við hesum innaneftirlitið. Elspa Danielsen frá Mat-